Bólkur D ✦ Svøríki



# Tann norðurlendska vónin

## Teir bláu og gulu ætla at leypa á og hava eisini spælararnar til tað



*Henke Larsson ger comeback á svenska landsliðnum, og hann plagar at verða góður fyri nøkur mál*

Mynd: Polfoto

SVØRÍKI
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Svøríki og Danmark vóru í sama EM-undanbólki. Liðini vóru í holt við at leika ein dreymadyst, har støðan var javnleikur 3-3. Men so missur fyrst danski spælarin, Christian Poulsen fatningin og slær Marcus Rosenberg hjá Svøríki, og dómarin vísir honum av vølli, og dømir brotsspark til Svøríki. Men so hendir tað, sum ikki skal henda, og sum enn ríður dønum sum marran. Ein danskur viðhaldsmaður, sum enntá býr í Suður-Svøríki(!) rennir inn á vøllin og ætlar at sláa týska dómaran, Herbert Fandel, kaldan. Dómarin steðgar dystinum, og Svøríki verður dømt til at vinna dystin. Svøríki er enn einaferð við til eitt endaspæl, meðan Danmark situr uttanfyri. Svøríki er í bólki við Spania, Russlandi og Grikkalandi, og hevur Svøríki ein góðan møguleika at vinna seg víðari til fjórðingsfinalurnar. Tó hevði Svøríki eina ringa aðalroynd sunnudagin, har teir á heimavølli taptu 0-1 ímóti Ukraina.

**Góðir offensivir leikarar**

Við spælarum sum Johan Elmander, Zlatan Ibrahimovic, Frederik Ljungberg, og nú eisini Henrik "Henke" Larsson - sum tekur enn eitt tørn fyri landsliðið – kann Svøríki verið ein stór hóttan fyri mótstøðulið.

Markus Rosenberg, sum spælir fyri Werder Bremen í týsku bundesliguni plagar eisini at verða góður fyri nøkur mál. Zlatan Ibrahimovic er millum kendastu og dýrastu fótbóltsspælararnar í Evropa, og er hann í góðum lagi skulu Spania, Russland og Grikkaland veruliga ansa sær. Johan Elmander hevur ikki havt eina optimala heilsu, og hevur hann havt manglandi ilt í blóðnum. Ein kostætlan hevur tó bøtt um heilsuna hjá Elmander, og hevur gjørt hann til ein enn sterkari og betri fótbóltsspælara. Í árinum 2004-2006 spældi Elmander við Brøndby, og er hann ein tann besti spælarin, sum nakrantíð hevur spælt við Brøndby.

Parturin av svensku ítróttarpressuni, sum hevur hug at fara í sjálvsving ivast ikki í at nevna Zlatan og Elmander til "Heimsins besta álopspar". Elmander leggur eina við, at tað at spæla saman við Zlatan er við til at hækka støðið hjá honum. Zlatan ásannar, at Elmander rennur meiri enn hann, og at hann tí setur stóran prís uppá samstarvið við Elmander.

**Onkuntíð rok**

Tó at svenskarar eru kendir fyri at verða eitt disiplinerað fólkaslag, so hevur veruligt rok onkuntíð verið í svensku landsliðsleguni. Frederik Ljungberg og risin í svensku verjuni, Olof Mellberg bardust á einari venjingarlegu í 2002. Báðir eru við í hópinum, og tí verður eisini uppgávan hjá Lars Lagerbäck at síggja til, at samhaldið verður optimalt í svensku EM-leguni.

Svøríki kom í hálvfinaluni tá EM var í Svøríki í 1992. Í HM-høpi hevur Svøríki vunnið silvur í 1958, og bronsu í 1994 og í 1950. HM-bronsuna í 1994 valdu svenskarar, sum "Aldarinnar ítróttarbragd" í 2001.

Svøríki og Føroyar spældu ein venjingardyst fyrst í hesi øldini í einari innandura fótbóltshøll í Växsjö. Dysturin endaði 0-0, eftir at Jákup Mikkelsen hevði bjargað einum brotssparki.

### Svøríki

1 Andreas Isaksson
2 Mikael Nilsson
3 Olof Mellberg
4 Petter Hansson
5 Fredrik Stoor
6 Tobias Linderoth
7 Niclas Alexandersson
8 Anders Svensson
9 Fredrik Ljungberg
10 Zlatan Ibrahimović
11 Johan Elmander
12 Rami Shaaban
13 Johan Wiland
14 Daniel Majstorovic
15 Andreas Granqvist
16 Kim Källström
17 Henrik Larsson
18 Sebastian Larsson
19 Daniel Andersson
20 Marcus Allbäck
21 Christian Wilhelmsson
22 Markus Rosenberg
23 Mikael Dorsin

Venjari: Lars Lagerback